

Mynd: BP

# 100 norsk frálandaskip eru arbeiðsleys

**Jógvan Hugo Gardar**

07.11.2015 - 09:45

Oljan.fo

Nú er talið á frálandaskipum í norska flotanum uttan nakað at gera farið uppum 100 skip. Sambært einum yvirliti sum dagens Næringsliv hevur sett upp, so er talið á frálandaskipum sum liggja fyri teym komið uppá 104.

Fleiri reiðarí velja nú at leggja skipini, í staðin fyri at lata tey sigla í sokallaða spotmarknaðinum, tí hetta gevcur í løtuni ov lítið.

Hesa vikuna hava millum annað hesi reiðaríini lagt skip:Deep Sea Supply, Siem Offshore, Viking Supply Ships og Island Offshore.

Sambært meklaranum Westshore eru nú 81 skip á listanum yvir norsk frálandaskip uttan arbeiði, men tey telja ikki seismikk- og subsea-skip við.

Higartil hava vit ikki hoyrt nógv um føroyingar sum eru raktir av mongu uppsøgnunum í Noregi. Orsøkin tykist at vera at tað enn er møguligt at fáa nýtt arbeiði á sjónum - kanska uttanfyri oljuvinnuna.Norsku manningarfeløgini siga at tey fáa fleiri og fleiri telefonir frá limum sum boða frá at teir eru uppsagdir ella hava brúk fyri ráðum. Manningarfeløgini rokna við munandi fleiri uppsøgnum í 2016, tí boðini frá reiðaríunum týða uppá at tey ikki rokna við at broyting kemur í við tað fyrsta.